# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*»Steypakappingin er soleiðis, at tú spælir nakrar dystir, og StÍF vinnur til síðst«*

*Bárður Nielsen, VÍF, á kykmyndum á portal.fo*

# Marian vil fegin á landsliðið



*Rósurnar í Føroyum hava verið nógvar, og sjálvur hevði Marian einki havt ímóti, at føroyska tilknýtið eisini sást á passinum. Men hann ynskir eisini at halda fast um rumenska statsborgaraskapin, og tað ber ikki til sambært lóggávuni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Forðingin fyri dupultum statsborgaraskapi tykist vera tað einasta, sum heldur Marian Cirloganescu burtur frá føroyska hondbóltslandsliðnum**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er neyvan nakar sum helst ivi um, at besti málverjin í føroyskum manshondbólti eitur Marian Cirloganescu. StÍF hevur nú í fleiri ár verið ein av fremstu garantunum fyri árligu steypaveitsluni hjá StÍF. Ja, í somikið nógv ár, at fólk eisini eru farin at tosa um møguleikan fyri at hava hann á føroyska manslandsliðnum.

**Ov ungur at siga nei-takk**

Sjálvur hevur Marian so avgjørt heldur einki ímóti hesum. Tvøtur ímóti, so hevur verið arbeitt við málinum, men ein meira enn 40 ára gomul konventión, sum ikki loyvir dupult statsborgaraskapi, forðar tó fyri hesum.

- Eg varð spurdur av landsliðsvenjaranujm, um eg hevði hug at spæla fyri føroyska landsliðið. Sjálvur haldi eg ikki, at eg eri somikið gamal, at eg havi ráð at lata ein slíkan møguleika fara framvið.

- Men reglurnar, sum forbjóða dupultum statsborgaraskapi, eru ein forðing í hesum. Eg veit ikki, hvussu mín framtíð í Føroyum sær út, tá eg ikki spæli hondbólt meira. Tí vil eg hava møguleikan at flyta aftur til Rumenia, men tann møguleikan kann eg missa, um eg ikki kann hava dupultan statsborgaraskap. Sum eg havi skilt tað, so er spurningurin kannaður, men niðurstøðan er, at lóggávan ikki loyvir dupultum statsborgaraskapi, og so er ikki so nógv at gera við tann spurningin, sigur Marian.

# Betra liðið vann



*Hóast tað neyvan altíð er eins stuttligt við harðari venjing, so fekk Henrik Gerster ein lufttúr, tá sama venjing hevði givið úrslit í fyrsta gullinum á árinum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Venjarin hjá Stjørnuni, Henrik Gerster, var ein glaður maður eftir sigurin í finaluni í Coca Cola-kappingini ímóti VB. Hann helt heilt víst, at sigurin var fult uppiborin.

- Eingin ivi er um, at betra liðið vann dystin í dag. Tær fylgja væl við fyrstu løtuna av dystinum, men so við og við taka vit yvir og vinna okkum eina avgerandi leiðslu. Í seinna hálvleiki royna vit bara at halda fast um leiðsluna, og eg haldi ikki, at sigurin nakrantíð var í vanda.

Henrik Gerster hevði eisini eina greiða meining um, hví júst Stjørnan gjørdist vinnarin av finaludystinum og ikki VB.

- Vit hava vant ótrúliga hart í ár, og eg haldi tað vera týðiligt, at okkara leikarar eru væl betri fyri kropsliga enn tær eru. Vit megna at koyra á allan dystin, og vit stressa tær bæði í okkara verjuspæli og í okkara álopsspæli. Vit hava stutt sagt meir kreftir enn tær, og hetta vinnur okkum dystin í dag, staðfesti ein fegin stjørnuvenjari eftir sigurin.

**-teitur**